# Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini - avgerðir

| Mál nr. : | Lóg: | Avgerð tikin: |
|---|---|---|
| 22/17405 | ALS-lógin § 18 | 6. desember 2022 |

**Karantena, sum avleiðing av at siga seg úr starvi**


**Samandráttur:**
**Kært er um, at Arbeiðsloysisskipanin hevur avgjørt at geva kæraranum karantenu í sambandi við, at kærarin hevur sagt seg úr starvi. ALS vísir á, at bústaðarbroyting til aðra bygd ikki er haldgóð orsøk fyri at sleppa undan karantenu.**

**Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini staðfestir avgerðina hjá ALS. Avgerðin verður grundað við, at kærarin ikki hevur víst á haldgóða grund til at siga seg úr starvinum, og sambært § 18 í lóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing missur viðkomandi tískil rættin til stuðul í 8 vikur roknað frá tí degi, setanarliga tilknýtið hansara til arbeiðsgevaran er av.**


**Kærda avgerðin og grundgevingin fyri avgerðini**
Í avgerðini hjá ALS verður upplýst, at arbeiðsloysisstuðul verður játtaður frá 19.09.2022 orsaka av, at kærarin fær bíðidagar og karantenu.

Víst verður á, at sambært umsókn um arbeiðsloysisstuðul hevur kærarin sagt seg úr starvi, av tí at hann flytir til aðra bygd. ALS vísir á, at hetta er ikki haldgóð orsøk fyri at sleppa undan karantenu.

<u>Í ummælið frá 20. oktober 2022</u> vísir ALS á, at tey hava tann 10. august 2022 móttikið fráboðan um arbeiðsloysi frá kæraranum. Sama dag sendi ALS honum eina áheitan um vantandi skjøl m.a. umsókn og uppsøgn.

Umsókn um arbeiðsloysisstuðul varð móttikin tann 22. august 2022. Her upplýsti hann um orsøkina til arbeiðsloysi "Onnur orsøk", og at seinasti arbeiðsdagur var tann 22. juli 2022. Sum nærri frágreiðing um orsøkina til arbeiðsloysi skrivar hann, at hann er givin á arbeiðsplássinum vegna tað, at hann er fluttur við familjuni til aðra bygd at búgva, og tí ikki fær hildið fram á arbeiðsplássinum, at hann ikki hevur sagt upp skrivliga, og at hann ongantíð fekk nakað setanarbræv frá virkinum. At enda spyr hann um tað er møguligt at sleppa undan karantenu.

Tann 25. august 2022 sendi ALS honum teldupost, har heitt varð á hann um at fáa eina váttan frá seinasta arbeiðsgevara. Váttanin frá arbeiðsgevaranum varð móttikin tann 26. august 2022, og sambært hesari segði kærarin sjálvur upp, og hevði hann seinasta arbeiðsdag tann 22. juli 2022.

Við støði í fyriliggjandi upplýsingum hevur ALS tikið avgerð um, at kærarin leyk treytirnar fyri at fáa arbeiðsloysisstuðul, men ikki hevði haldgóða grund til at siga seg úr starvi, og fekk

hann karantenu í 8 vikur sambært § 18 í ALS-lógini. Bíðidagar og karantena vóru roknað frá tí tilknýti til arbeiðsgevaran endaði t.v.s. frá tann 23. juli 2022. Kærarin hevði ikki skjalprógvað ella víst á, at talan var um serligar orsøkir sambært viðmerkingunum til ALS-lógina, til at hann segði upp starvið. Avgerðin varð send honum í brævið dagfest tann 19. september 2022.

ALS viðmerkir, at eftir galdandi reglum í § 18 í ALS-lógini missir arbeiðsleysur, sum er burturvístur orsakað av tænastubroti, rættin til stuðul í 8 vikur at rokna frá tí degi, setanarliga tilknýti hansara til arbeiðsgevaran er av. Sama er galdandi, um so er, at hin arbeiðsleysi uttan haldgóða grund hevur sagt seg úr starvi.

Í hvørjum einstøkum føri ger ALS eina ítøkiliga meting, um talan kann vera um haldgóða grund til uppsøgnina. Haldgóð grund kann t.d. vera, at arbeiðsgevari ikki heldur gjørdar avtalur, sáttmála ella grovliga ger brot á eitt nú arbeiðsumhvørvisreglur.

Ein persónur, sum er vorðin arbeiðsleysur orsaka av at hava sagt seg úr starvi, skal lýsa umstøðurnar nærri í sambandi við uppsøgnina og grundgeva fyri, at talan var um haldgóða orsøk fyri at hava sagt seg úr starvi.

Útgangsstøðið er, at arbeiðsloysisstuðulin fellur burtur í einum 8 vikurs skeiði, uttan so at vísast kann á eina haldgóða grund fyri uppsøgnini.

Kærarin grundgav uppsøgn sína við, at hann flutti til aðra bygd við familjuni. ALS metti ikki, at grundgevingin hansara, kundi javnsetast við tær orsøkir sum viðmerkingarnar til ALS-lógina nevna sum dømi um haldgóða orsøk til at siga seg úr starvi.

ALS metir tí, at avgerðin um at kærarin skuldi hava karantenu í 8 vikur frá 23. juli 2022 er røtt, tá hann ikki hevði haldgóða grund til at siga seg úr starvinum. Hetta við heimild í ásetingunum í § 18 í ALS-lógini, og skal eisini verða víst til dømini um haldgóða grund sambært viðmerkingunum til ALS-lógina.

**Kæran og upplýsingar kærarans til málið**
Kærarin skrivar í kæru frá 20. september 2022, at avgerðin varð grundgivin við, at hansara uppsagnargrund ikki var at meta sum haldgóð orsøk til at sleppast kundi undan karantenu. Hann er av teirri fatan, at orsøkin til flytingina er haldgóð. Hann eigur hús í bygdini, hann er fluttur til, børnini eru farin í ein góðan skúla, og uppsøgnin er grundað á heilt rímulig viðurskifti.

Sambært §18 í lóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing stendur: "Arbeiðsleysur, sum verður burturvístur orsakað av tænastubroti, missir samstundis rættin til stuðul í 8 vikur. Sama er galdandi, um so er, at hin arbeiðsleysi uttan haldgóða grund sigur seg úr starvi"

Kærarin heldur ikki, at hansara givna orsøk til uppsøgnina fellir undir ásetingina í hesi grein, sum verandi ein uppsøgn uttan haldgóða grund.

Hetta kann undirbyggjast við, at talan er um ein rættliga tyngjandi sekt, har fyrsti parturin tosar um burturvísing vegna tænastubrot. Tá tað so víðari stendur, at tað sama er galdandi fyri uppsigan av starvi uttan haldgóða grund, má leggjast til grund, at her er talan um uppsagnir, ið

veruliga mangla haldgóða grundgeving. Vísandi til frágreiðingina um orsøkina til uppsøgnina, má standa klárt, at grundgevingin er haldgóð, og als ikki hoyrir inn undir §18.

Kærarin metir ikki, at avgerðin um karantenu er rímulig, tá ein arbeiðsleysur, ið flytir saman við familjuni, skal verða sektaður við eini karantenu á 8 vikur. Hetta er fyri tað fyrsta ikki proportionalt, harnæst, so metir hann at uppsagnargrundin er haldgóð

**Lógargrundarlag**
Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 177 frá 17. desember 2020 (ALS-lógin)

**Avgerðin hjá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini**
Ásett er í § 18 í ALS-lógini, at arbeiðsleysur, sum er burturvístur orsakað av tænastubroti, missir samstundis rættin til stuðul í 8 vikur at rokna frá í degi, setanarliga tilknýtið hansara til arbeiðsgevaran er av. Sama er galdandi, um so er, at hin arbeiðsleysi uttan haldgóða grund hevur sagt seg úr starvi.

Í serligu viðmerkingunum til løgtingslóg nr. 71 frá 22. mai 2015 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (sí løgtingsmál 114/2014) stendur, at um tað er haldgóð grund verður avgjørt eftir ítøkiligari meting hjá ALS. Í hesum sambandi verður víst á, at sum haldgóð grund kann t.d. vera, at arbeiðsgevarin ikki heldur gjørdar avtalur ella grovliga ger brot á eitt nú arbeiðsumhvørvisreglar.

Eisini stendur í serligu viðmerkingunum, at ein persónur, sum er vorðin arbeiðsleysur orsaka av at hava sagt seg úr starvi, skal lýsa umstøðurnar nærri í sambandi við uppsøgnina og grundgeva fyri, at talan var um haldgóða orsøk fyri at hava sagt seg úr starvi. Sum dømi um slíkar umstøður kann nevnast:

- Vánaligt arbeiðsumhvørvi, ið er íkomið grundað á, at arbeiðsgevarin er farin út um leiðslurætt sín, ella at talan er um, at fysisku karmarnir fyri arbeiðinum, t.d. sjálvt arbeiðsplássið, er heilsuskaðiligt
- likamlig ella sálarlig sjúka, ið verður váttað við læknaváttan
- vantandi lønarútgjalding. Vanliga verður kravt, at seinkingin er uppá umleið eina viku, og at arbeiðstakarin hevur gjørt arbeiðsgevaran kunnugan um seinkingina. Hetta eigur at verða gjørt skrivliga
- avgerandi broytingar í setanartreytunum sum t.d.
- broyta lønina
- seta arbeiðstíðina niður móti at minka lønina
- broyta akkordtreytir til skaða fyri arbeiðstakaran
- krevja at arbeiðið verður munandi meira ábyrgdarfult ella umfatandi. Hann kann tó í styttri tíðarskeið krevja, at arbeiðstakarin átekur sær størri arbeiðsskyldur
- áleggja arbeiðstakaranum slíkar broytingar, at arbeiðið reelt verður eitt annað
- broyta starvsheitið hjá viðkomandi munandi ella í stóran mun at taka heimildirnar frá viðkomandi

- flyta arbeiðsplássið, so útreiðslurnar og tíðarnýtslan at koma til og frá arbeiði vaksa munandi

Meginreglan er, at arbeiðstakarin hevur givið arbeiðsgevara sínum eina skrivliga ávaring um broyttu viðurskiftini, fyri at talan kann vera um uppsøgn við haldgóðari grund.

Í hesum føri hevur kærarin greitt frá, at hann hevur sagt seg úr starvi, tí hann skuldi flyta við familjuni til aðra bygd, har hann eigur hús. Hann vísir eisini á, at flytingin hevur verið góð fyri trivnaðin hjá familjuni, tá børnini stórtrívast í nýggja skúlanum, afturímóti mistrivnaði í gamla skúlanum.

Kærunevndin metir, at ein uppsøgn vegna flyting frá einari bygd í Føroyum til aðra, er ikki at meta sum ein slík haldgóð grundgeving fyri at siga seg úr starvi, at sleppast kann undan karantenu. Víst verður í hesum sambandi til serligu viðmerkingarnar til § 18 í ALS-lógini.

Dentur er eisini lagdur á, at allar Føroyar eru at meta sum ein arbeiðsmarknaður, tá tað kemur til arbeiðsávísing, sí § 24, stk. 2 í lóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Til samanberingar kann vísast á avgerð hjá Kærunevndini hjá ALS frá 26. mai 1999, har kærari hevði sagt upp starv sítt í Danmark, tí maðurin hevði fingið arbeiði í Føroyum og øll familjan flutti við.

Í hesi avgerð varð sagt: *"Um sammett verður við innanlanda flyting er eingin ivi um, at ein uppsøgn við tilvísing hertil ikki er at meta sum ein slík haldgóð grund. Kærunevndin metti ikki, at viðurskiftini við eini flyting úr Danmark í sær sjálvum í nóg stóran mun talar fyri einum øðrvísi úrsliti. Hinvegin metti Kærunevndin, at um ein slík flyting er orsakað av, at familian annars flytir heim til Føroyar, er uppsøgnin at meta sum gjørd við haldgóðari grund. Kærunevndin avgjørdi at geva kæraranum viðhald í kæruni"*

Í avgerðini frá 1999 hevur kærunevndin greitt givið til kennar, at ein innanlands flyting er ikki at meta sum ein haldgóð grundgeving fyri at siga seg úr starvi. Nevndin heldur fast í hesi tulking, serliga vísandi til, at allar Føroyar sambært ALS-lógini eru at meta sum ein arbeiðsmarknaður og broytir tað ikki støðuna, at øll familjan flytir við kærara til aðra bygd.

**Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini staðfestir avgerðina hjá ALS. Avgerðin verður grundað við, at kærarin ikki hevur víst á haldgóða grund til at siga seg úr starvinum, og sambært § 18 í lóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing missur viðkomandi tískil rættin til stuðul í 8 vikur roknað frá tí degi, setanarliga tilknýtið hansara til arbeiðsgevaran er av.**